# Dansispæl - Ríða Edeling

**1.Dreingir:**
Fram ríður offur,
Fram ríður Edelingur,
Fram ríður Hómanns Edelingur,
Fram ríða Kongsins menn allir.

**2.Gentir:**
Hvat vil offur,
Hvat vil Edelingur,
Hvat vil Hómanns Edelingur,
Hvat vilja Kongsins menn allir ?

**3.Dreingir:**
Biðla vil offur,
Biðla vil Edelingur,
Biðla vil Hómanns Edelingur,
Biðla vilja Kongsins menn allir.

**4.Gentir:**
Hvør er offur,
Hvør er Edelingur,
Hvør er Hómanns Edelingur,
Hvørjir eru Kongsins menn allir ?

**5.Dreingir:**
Trælur er offur,
Trælur er Edelingur,
Trælur er Hómanns Edelingur,
Trælir eru Kongsins menn allir.

**6.Gentir:**
Ríð burt offur,
Ríð burt Edelingur,
Ríð burt Hómanns Edelingur,
Ríði burt Kongsins men allir!

**7.Dreingir:**
Vreiður ríður offur
Vreiður ríður edelingur,
Vreiður ríður Hómanns Edelingur,
Vreiðir ríða Kongsins menn allir.

**8.Dreingir aftur:**
Aftur ríður offur,
Aftur ríður Edelingur,
Aftur ríður Hómanns Edelingur,
Aftur ríða Kongsins menn allir.

**9.Gentir:**
Hvør er offur,
Hvør er Edelingur,
Hvør er Hómanns Edelingur,
Hvørjir eru Kongsins menn allir ?

**10.Dreingir:**
Skipari er offur,
Skipari er Edelingur,
Skipari er Hómanns Edelingur,
Skiparar eru Kongsins menn allir.

**11.Gentir:**
Tak við offur,
Tak við Edelingur,
Tak við Hómanns Edelingur,
Takið við Kongsins menn allir.

**12.Dreingir og Gentir:**
Glaður ríður offur,
Glaður ríður Edelingur,
Glaður Ríður Hómanns Edelingur,
Glaðir ríða Kongsins menn allir.

*Vanligt er eisini at gentirnar spyrja ”hvat gevur offur” ístaðin fyri ”hvør er offur” í ørindi 4 og 9. Tá kunnu dreingirnir svara ”jørð gevur offur” og ”gull gevur offur”.*

This document was created with Win2PDF available at http://www.win2pdf.com.
The unregistered version of Win2PDF is for evaluation or non-commercial use only.
This page will not be added after purchasing Win2PDF.